| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**27. apríl 2006** | Blað nr.:<br>**6536**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **27. apríl 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **60/06-89/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Randi Fredriksberg

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.25:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**62/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 27. apríl 2006:** Tikið til eftirtektar.

**63/06** **2006-1180**

**Broyting av Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í sambandi við byggiætlan hjá Valbirni Dalsgarð heiman fyri Hamaran á Argjum.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari, hevur fingið góðkenning at keypa uml 110.000 $m^2$ av lendinum heiman fyri Hamaran á Argjum til bústaðarbygging (BeJour nr. 2004-1604).

Økið, ið talan er um, liggur í partvís í C3-øki (miðstaðaendamál) uml. 37.000 $m^2$, 4. gr. (landbúnaðarøki) 29.000 $m^2$ og restin í A1-sethúsaøki.

Ætlanin er at byggja raðhús og íbúðir.

Sambært almennu byggisamtyktini er loyvt at byggja íbúðir á C3-økinum, í 4. grundumráði er bert loyvt at byggja til landbúnaðarendamál, og í A1-øki er bert loyvt at byggja sethús og við serloyvi frá byggivaldinum tvíhús og raðhús til eitt húski.

Av tí at ætlanin er at byggja raðhús og íbúðir, er tað rættast at broyta tann partin av økinum, sum liggur A1-øki og 4. gr., til A3-øki. Parturin, sum liggur í C3-øki, nýtist ikki at verða broyttur.

Eisini verður neyðugt at skipa alla verkætlanina í eini serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært hjálagda kortskjali, dagf. 28. mars 2006, og at umsitingin fer í gongd við at skipa økið í eina serstaka byggisamtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**64/06** **2005-2989**

**Matr. nr. 171 Nólsoy: Fyrispurningurm frá arvingunum um kommunan er áhugað at keypa húsini.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Húsini eru bygd í 1972. 130 m² stór í einari hædd við kjallararúmi og fýrrúmi. Í 1990-unum eru vindeyguni skift út, og øll húsini bjálvað og kløðd av nýggjum við eyka klædningi. Í 2005 vóru nýggj hitarør løgd úr kopari.

Trivnaðarfyrisitingin hevur verið í Nólsoy og hugt eftir húsunum. Við minni ábótum verður mett, at hølini er vælegnað til ætlaða dagtilhaldið/dagstovnin fyri eldri. Eisini eru góðir møguleikar hjá kommunulæknunum at hava viðtalu har. Harumframt kundi Heimarøktin havt skrivstovu- og goymsluhøli í húsunum.

Húsaumsitingin hevur eisini verið og hugt eftir húsunum. Húsini eru í góðum standi, men áðrenn húsini verða tikin í brúk, mælir húsaumsitingin til, at niðanfyri standandi verður gjørt.

- Nýtt wc til handikapp gerast við úthurðina.
- Tað gamla wc'ið verður broytt nakað, t.d. baðikarið tikið burtur. Gera garderobu í gongini
- Skifta úthurðar út við breiðari hurðar, 9M
- Máliarbeiði innan
- Umvæla vindeyguni, so tey ganga betur
- Umvæla trægarð

Kostnaður fyri hetta arbeiði verður mettur til at kr. 150-200.000,00.

Innbúgv er ikki tikið við.

Kommunulæknaviðtalan er nú í hølum í húsunum matr. nr. 97c, sum kommunan eigur. Hesi húsini eru ikki serliga væl egnað til endamálið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at kommunan ognar sær húsini til frammanfyri nevndu endamál, og at keypið verður fíggjað av konto 90 Íløgur á eldraøkinum.

Samstundis verðru mælt til at selja húsini matr. nr. 97c, og at vinningurin av søluni verður góðskrivaður konto 90.

**Sosiala nevndin 7. mars 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og sosialdeildarleiðaranum og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at ogna sær húsini og at beina málið í nólsoyarnevndina og til eldraráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av ognini.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, at kommunan keypir ognina fyri kr. 1.000.000,00 umframt kr. 150.000,00 til ymsar umvælingar.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annika Olsen.

**65/06** **2002-2239**

**Viðv. ognini, matr. nr. 1385b, í Gundadali.**

Kommununi stendur í boði at keypa 833 m² á stadionøkinum í Gundadali.

Brúk verður fyri lendinum, tá bygningarnir kring Tórsvøll skulu byggjast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at keypa umrødda lendi.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við kommunustjóranum og keypa ognina fyri kr. 2.000.000,00, og at seljarin verður búgvandi.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, at kommunan keypir ognina.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**66/06** <u>2000-3032</u>

**<u>Jørð, kloakk og fundamentarbeiði til samanbygd hús í Hoyvíkshaganum/ Søla av Randarhúsum í Hoyvíkshaganum Suður, t.e. grundstykki, betongarbeiði og projekt, og at kommunan ognar sær sokklarnar nr. 21 og 22 til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tann møguleika, at samtakið fær arbeiðið at gera jørð, kloakk og betongarbeiði klárt til at byggja húsini, og at lonirnar síðani verða latnar byggimeistaranum at byggja og selja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. juni 2003:** Samtykt at kommunan letur gera útbjóðingartilfar av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á, og at biðja samtakið, sum ger útstykkingararbeiðið, um tilboð at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at heita á fíggjarnevndina um at leggja pening út til projekteringsarbeiðið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2003:** Samtykt at leggja upp til kr. 500.000,00 út fyri projektering.

**Ískoyti:**
Avtala er gjørd við arkitektar 99 um projektering av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á.

Neyðugt er at gjøgnumganga og projektera eina heila lon fyri at kenna neyðugu fortreytirnar fyri projektering av fundamentsarbeiðnum.

Síðani kann projektið seljast við lonini, tá ið henda verður seld.

Avtalaði kostnaðurin fyri projektering av einari heilari lon og jørð, kloakk og fundamentsarbeiði fyri restina av lonunum er kr. 654.830,00 + mvg, ella kr. 695.757,00 við 6,25% mvg.

Fyri at gjøgnumføra hetta er neyðugt við eini eykajáttan uppá uml. kr. 200.000,00.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2004:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Vísandi til at talan er um eina serliga verkætlan, har ein fyritreyt fyri, at ætlanin skal verða væl eydnað, er, at byggingin verður gjørd sambært ætlaða projektinum, og at neyðugt er at projektera eina lon fyri at gera betongarbeiðið liðugt, samtykti nevndin at heita á fíggjarnevndina um at leggja út kr. 200.000,00 afturat til projektering av einari lon, sum umfatar øll húsasniðini.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, treytað av at kommunan eigur projektið og kann nýta hetta til hinar lonirnar uttan meirkostnað.

**Ískoyti:**
Nú er projekteringin av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini liðug, og eitt samtaki hevur biðið um at sleppa at geva eitt tilboð upp á arbeiðið sambært samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 2. juni 2003.

Tilboðið var lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. september 2004:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodna útbjóðing til Byggitek, Articon, Guttesen & Staksberg, J&K Petersen og MT Højgaard.

**Ískoyti:**
Lisitatión var mánadagin 27. september 2004, og komu 4 tilboð inn, MT Højgaard bjóðaðu ikki.

Ráðgevararnir, Arkitektarinir 99, hava gjøgnumgingið øll tilboðini og mæla til at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevði lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við ráðgevarunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevur lægsta boð, og at fíggjarlig uppseting fyriliggur til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at leggja út upp til tkr. 7.000 afturat fyri bygging, ráðgeving, eftirlit og meirvirðisgjald.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera jørð, kloakk og sokklar til randarhúsini í Hoyvíkshaganum Suður er væntandi liðugt ultimo januar 2006.

Kommunan hevur í hesum sambandi latið gjørt eitt fullfíggjað projekt uppá eina av átta lonum.

Lon 5, sum er liðugtprojekterað, umboðar øll húsasniðini, sum kommunan hevur góðkent í økinum, og eru sokklarnir háttaðir so, at húsasniðini frá Lon 5 verða sett ymiskt saman á hvørja lon sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða allar sokklarnar til randarhúsini samlað til sølu millum áhugaðar entreprenørar/byggisamtøk til kostprís til tann keypara, ið hevur lægsta søluprís at selja víðari.

Neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at teir, ið bjóða, eru førir fyri at fullføra projektið, tí eigur fyrivarni eisini at verða tikið um ikki at taka av nøkrum boði.

Eisini verður mælt til at áseta m.a. hesar sølutreytir:

Keyparin skal binda seg til:

at halda seg til byggisnið sambært projektinum fyri allar lonirnir, tó kunnu smærri tillagingar loyvast í samráð við kommununa,
at gera samlaðu byggingina lidna innan 3 ár,
at tann, sum keypir randarhús, skal vera á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu, og
at kommunan kann seta treytir í sambandi við hesa víðarisølu.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum og at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja til hægstbjóðandi og loyva víðarisølu til marknaðarprís.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Sjúrði Olsen um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jacobsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við samtyktini hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 26. oktober 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja sokklarnar fyri kostprís hvør sær ella saman til smærri entreprenørar í býnum og síðani at selja húsini aftur í fríari sølu.

**Býráðið 24. november 2005:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið hjá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Orsakað av veðri og øðrum óvantaðum trupulleikum, er arbeiðið at stoypa sokklarnar nakað seinkað, men er nú um at verða liðugt. So er klárt at bjóða økið út til sølu.

Í grein 4 í ásetingunum fyri A3 øki stendur.:

> *Hús mugu einans verða bygd <u>í einari hædd við nýttum lofti</u> og mugu ikki vera hægri enn <u>5 m til yvirgrind</u> og 9 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendi, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 er tó loyvt at leggja kjallaraloftið upp til 2,5 m oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.*
>
> *<u>Í heildarætlan ella í serætlan fyri náttúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.</u>*

Samanbygdu húsini eru sambært projektinum í 2 og 3 fullum hæddum og meira enn 5 m til yvirgrind. Tí er neyðugt at býráðið samtykkir projektið sum ein

serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, sum grein 4 heimilar. Hetta fyri at byggjast kann sambært projektinum.

Í sambandi við útbjóðingina er eisini neyðugt at frámatrikulera lendið, har samanbygdu húsini skulu standa, frá felagsøkinum.

Umsitingin metir tað verða rættast, at hvørt av samanbygdu húsunum eigur stykkið, har húsini standa á. Harafturat skal hvørt hús eiga 2 ávís parkeringspláss og ein skúr sambært hjáløgdu støðumynd.

Hendan loysnin er umrødd við Matrikulstovuna, sum tekur undir við henni. Matrikulstovan mælir eisini til, at øll samanbygdu húsini verða sundurbýtt, áðrenn bygt verður.

Í sambandi við verkætlanina "Stóratjørn" hava ynski verið um, at hava eina beinleiðis farleið, ið bindur Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn saman. Hetta kann merkja, at tvey tey eystastu húsini í lon 5, skulu takast burturúr ætlanini um samanbygdu húsini í Hoyvíkshaganum suður.

Av tí at Karlamagnusarbreyt gongur ígjøgnum eina útstykking, kann ein koyrivegur, við gjøgnumkoyrandi ferðslu, ikki gerast her, hetta vil broyta fortreytirnar fyri fólki, sum hevur keypt grundøki í Hoyvíkshaganum suður. Tí kann talan bert verða um eina gonguleið ígjøgnum økið.

Um nevndin samtykkir hesa farleiðina, er neyðugt at lýsa ein servitutt á økið, um at hetta er ein gonguleið og ikki ein koyrivegur, har bert eigarafelagið hevur átalurætt. Eisini má kommunan bera kostnaðin av tí arbeiði, sum er gjørt á økinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir byggiætlanina við samanbygdum húsunum í útstykkingini Hoyvíkshagi suður, sum ein serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki sambært projektinum fyri byggingina.

Eisini mælir býararkitekturin til, at samanbygdu húsini verða sundurbýtt sambært hjálagda kortskjali, soleiðis at hvørt hús eigur 2 ávís parkeringspláss og ein skúr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Síðani samtykt nevndin at heita á býráðið, at kommunan ognar sær sokklarnar nr 21 og 22 v.m. til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini at fíggja av útstykkingarætlanini fyri Hoyvíkshagan norðan fyri sambindingarvegin.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

67/06 2005-2467

**Innangarðsútskifting av Hest bygd**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Matrikulstovan fráboðar Tórshavnar kommunu í skrivi, dagfest 22. september 2005, at farið verður í gongd við innangarðsútskifting av Hest bygd.

Vanligt er at kommunur nýta henda møguleika at ognartaka lendið til øll almenn endamál smb. § 22. Hetta er tí, at tað ognartikna lendið verður latið av øllum eigindómum, og endurgjaldið verður latið yvir útskiftingarroknskapin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at kommunan fyribils ognartekur lendið sambært hjálagda korti, dagf. 1. nov. 2005, tíh.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2005:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at Tórshavnar kommuna ognartekur omanfyrinevndu øki til sethúsabygging, og at málið verður lagt fyri hest- og koltursnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Vísandi til at fundarfrásøgnin frá 7. november 2005 var skeivt skrivað, samtykti nevndin at beina málið í hest/koltursnevndina til ummælis.

**Hest-koltursnevndin 1. februar 2006:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

Eisini verður mælt til, at Tórshavnar kommunan ognartekur lendið millum vegin og havnaøkið.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**68/06** **2006-0848**

**Reinskan av Djúpagilsá og Hoydalsá, stig 3.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ì sambandi við reinsan av Hoydalsá, varð arbeiðsbólkur settur at kanna økið við tí fyri eyga at fáa Hoydalsá reina fyri kloakkvatn. Arbeiðsbólkurin kom tá til ta niðurstøðu at býta arbeiðið upp í 4 stig.

**Stigini eru hesi:**
Stig I Savnan av kloakkleiðingum við Hoydalsá oman fyri Vegin Langa
Stig II Savnan av kloakkleiðingum við Hoydalsá niðan fyri Vegin Langa
Stig III Savnan av veg og regnvatni oman fyri Vegin Langa
Stig IV Savnan av vegvatni frá Eystara Ringvegi

Umsitingin hevur saman við sp/f Martin E. Leo gjørt projekt við kostnaðarmeting fyri stig 3, ið er mett at hava størsta tørvin.

Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er mettur at verða kr. 7.458.178,00 íroknað projekt, eftirlit, ókendar útreiðslur v.m. Sí j. nr. 2006-0848/1.

Mælt verður til at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión, og at hesir verða arbeiðstakarar bodnir við:

Sp/f Robert Brockie
Sp/f Andreas Berg
Sp/f Maskinkoyring v/ Karl Paturson
p/f Articon
p/f J & K Petersen, Contraktors

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, stig nr. 3 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at játta kr. 7,5 mió. og at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitation at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti::**
Umsitingin saman við ráðgeva fara at greiða frá málinum. (Martin Leo og Torleif Dalsgaard koma kl. 17.00)

**Tilmæli:**
Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har '*faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging*' til eina verkætlan. Býarverkfrøðingurin mælir til, at beina málið í *fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.*

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum til fundin 9. mars 2006 at taka av íløgum til kloakkir fyri 2006 og 2007.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4.000.000,00 av íløgum í 2006 og kr. 4.000.000,00 av íløgum í 2007.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**69/06** **2004-0389**

**Nýtt vatnreinsiverk í Havnardali**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Orsakað av at býurin veksur og fyri at drýggja um vatnið í Villingardalsbrunninum, er ynski frá teknisku deild at fáa nýtt og størri reinsiverk úti í Havnardali.

17. juni 2004 játtaði fíggjarnevndin kr. 365.000 til forkanningar og gerð av byggiprogrammi, og er ein internur arbeiðsbólkur, Boði Haraldsson, Michael Jacobæus, Robert Thomassen og Viggo Christiansen komnir á mál við hesum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og deildarleiðarin fyri vatn- & gøtuljósdeildini mæla til at játtaðar verða kr. 400.000,00 av íløgum fyri 2005 til at gera dispositiónsuppskot og forprojekt til nýtt reinsiverk í Havnardali.

**Tekniska nevnd 7. apríl 1005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og deildarleiðaranum fyri vatn- & gøtuljósdeildini.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 25. august 2005:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Á fundi í teknisku nevnd 25. august 2005 varð kunnað um málið, og varð serliga tosað um kostnað, útsjónd og plasering. Avgjørt varð at kanna møguleikan at flyta nýggja verkið longur heim frá sjálvari byrgingini enn hvat mælt var til, og at kanna møguleikan at fáa meiri vatn í byrgingina í Villingadali.

Fyri at nevna tað síðsta fyrst, so er henda loysn sera kostnaðarmikil.

P/F Sofus M. Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingur, metir at ein ø200 mm tunnil boraður 1.200 m gjøgnum Gellingarklett fyri at koma vestur í Sundsá, vil kosta á.l. 6.000 x 1.200 = 7.2 mill. kr. + byrging um Sundsá, pumpuskipan og rørskipan niðan í tunnilin.

Verður ein rørleiðing løgd runt Gellingarklett vestur í Sundsá, verður kostnaðurin á.l. 5.000 x 2.500 = 12.5 mill. kr. + eykaarbeiðið.

Modell av nýggjum vatnverki, líkum tí í Villingadali, er gjørt av P/F Árna Winther, og er hóskandi pláss funnið, har fjarðstøða frá byrgingini er størri enn í fyrra tilmæli.

Eisini hevur P/F Sofus M. Jakobsen gjørt eina meira fullfíggjaða innrætting av verkinum.

Kostnaður av vatnverki, nýggjari kloakk og nýggjari vatnleiðing heim á Norðasta Horn er mett til kr. 57,5 mill. (íroknað 8,5 mió. kr. í projektering).

Árligar rakstrarútreiðslur eru mettar til kr. 320.000. Her er hugsað um olju, streym og kemikaliur v.m.

Danskt felag, Uniq Enviro er komið við einum tilboði uppá eitt alternativt vatnverk.

Í stuttum fevnir hetta tilboð um ein nýggjan reinsihátt, ið spakuliga er við at mennast. Talan er um membranfiltur, sum vatnið verður trýst ígjøgnum. Hesi membranfiltur eru so tøtt at sjálvt ikki bakteriur sleppa ígjøgnum.

Hetta seinna verkið tekur væl minni pláss enn tað fyrr nevnda, so her er møguleiki at byggja nýggjan bygning á fundament/kjallara sum er heimanfyri og fast í verandi vatnverk.

Kostnaður fyri hetta verk, bygning og leiðingar heim á Norðasta Horn er á leið kr. 45 mill.

Árligar rakstrarútreiðslur eru mettar til:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. Streymur | 570.000 kWh á kr. 0,99 + kr 5.280 | kr. | 570.000 |
| 2. Viðlíkahald, reinsing og eftirlitsvitjan | | - | 275.000 |
| 3. Aðrar útreiðslur | | - | 45.000 |
| 4. Nýggjar membrankasettir* | | - | 660.000 |
| Í alt | | kr. | 1.550.000 |

*Henda útreiðsla tekur fyrst við eftir 10 árum.

Fyrimunir við hesum verki í mun til hitt fyrr nevnda eru:
Minni íløga, skjótari at byggja og møguliga er hetta ein reinsiskipan, sum fer at mennast komandi ár og gerast alt meira vanlig.

Vansarnir eru - stóra rakstrarútreiðslan og óvissan hvussu verkið fer at roynast. Membranfiltrering er roynd í nøkur ár, men júst hetta modellið er so nýtt, at einki verk er uppsett enn.

Kunnað verður nærri um málið á fundinum. Eisini verður kunnað um tey reinsiverk í Oslo, ið umsitingin hevur kunnað seg um á heysti í fjør.

**Tilmæli:**
Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har 'faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging' til eina verkætlan.

Havandi í huga góðu royndirnar av vatnverkinum í Villingadali, stóru rakstrarútreiðslurnar og óvissuna við nýggju membran-filtreringini og ta heildarmynd umsitingin hevur fingið av norskum vatnverkum á kunningartúrinum í oktober 2005 mæla leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildina og býarverkfrøðingurin til, at arbeitt verður víðari við projektuppskotinum hjá P/F Sofus M. Jakobsen, og at beina málið í fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Víst verður til notat, dagfest 18. apríl 2006, frá leiðaranum fyri vatn- og gøtuljósdeildini og býarverkfrøðinginum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina, at játta kr. 400.000,00 av íløgum til projektering og at velja bygginevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Jan Christiansen um at beina málið aftur í nevnd.

70/06 **2005-0638**

**Arkitektavirkið Árni Winther vegna Adventistaskúlan: Umsókn um byggiloyvi til nýggjan smábarnaskúla á matr. nr. 1056h við Hoyvíksvegin.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til at Adventistaskúlin, matr. nr. 1056h, hevur ætlanir um at fara undir at byggja ein nýggjan smábarnaskúla við Hoyvíksvegin verður søkt um at keypa matr. nr. 1056e. Um fíggjarnevndin og býráðið samtykkir keypið, skal matr. nr. 1056e leggjast saman við 1056h.

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í umráðispartinum A1.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Matr.nr.1056e, Tórshavn, er 214 m².

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, treytað av at fíggjarnevndin og býráðið samtykkir at selja matr. nr. 1056e, at loyva at samanleggja matr. nr. 1056e við matr. nr. 1056h og senda málið víðari til fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at selja økið fyri kr. 300,00 fyri fermeturin.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at selja matr. nr. 1056e fyri kr. 300,00 pr. m².

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir til at selja fyri geiraprís, sum er kr. 98,00 pr. m².

**Býráðið 23. juni 2005:** Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskot hjá Jan Christiansen um at selja økið fyri kr. 98,50 pr. fermetur, sum fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini sum var samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin D. Jakobsen, Elin Lindenskov og Jan Christiansen.

Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen greiddu ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
**08.12.05:** Byggideildin hevur móttikið nýggjar tekningar j. nr. 2005-0638/13. Tað er Norðsetur, sum hevur gjørt nýtt uppskot til nýggja barnaskúla.

**08.12.05:** Á fundi hevur umsøkjari fingið upplýst, at neyðugt verður at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina aftur, tí nýggju tekningarnar eru so ólíkar teimum, sum vóru grundarlagið fyri keyp av lendi

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at taka støðu til nýggju tekningarnar. Um so er, at nevndin góðtekur tekningarnar at leggja málið fyri teknisku nevnd at taka støðu til ferðsluviðurskiftin í sambandi við til- og frákoyring.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin heldur, at nýggju tekningarnar bróta munandi frá teimum upprunaligu, og heitir á býararkitektin um at tingast við umøkjaran um tær.

Nevndin samtykti eisini at heitt verður á umsøkjaran um at koma við ætlanum um eitt nú skipan av ferðsluviðurskiftunum í sambandi við skúlan.

**Ískoyti:**
Uppskot til ferðslulumma til av- og áskipan av børnum er gjørt. Vísandi til notat nr. 2005-0638/20 eigur støða verða tikin til uppskotið.

**Ferðslunevndin 7. mars 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum við smærri broytingum, sum ferðslubólkurin letur gera at leggja fyri teknisku nevnd.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Kostnaðurin fyri arbeiðið verður leystliga mettur til kr. 350.000,00.

**Tilmæli:**
Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har 'faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging' til eina verkætlan.

Býarverkfrøðingurin mælir til at beina málið í fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 350.000,00 av íløgum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Katrin Dahl Jakobsen.

**71/06** **2005-1422**

**Kommunalur sambindingarvegur frá útst. millum Gilja til Klingruna**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Málið um linjuføringina av fyriliggjandi uppskoti hevur verið til viðgerðar í sambandi við samtyktina hjá teknisku nevnd 19. oktober 2004 (sí mál nr. 200402321).

Harumframt hevur Landsverk, saman við umsitingini, havt ein kunnandi fund tann 14. februar 2005 fyri politiska myndugleikanum, har framlagt var eitt nýtt uppskot, sum tekur støði í, at Landsverk ætlar at sleppa ætlanini at gera landsveg á Skarðshjalla, og at íbindingarnar til útstykkingarvegir verða gjørdar við flættingum. (Framløgan er skrásett undir j. nr. 20010407/32).

Nýggja uppskotið líkist tí fyrra - tó verður neyðugt at flyta Ytra Ringveg uml. 10 m longur norður frá verandi íbinding við Løgmannabreyt. Hetta má gerast, um pláss skal gerast fyri planskildi íbindingini (flættingum) við hetta vegamótið.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Víst verður til framløguna tann 14. februar 2005 (j. nr. 20010407/32).

Støða skal takast til um farast skal undir at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, ella um umsitingin saman við Landsverki skal arbeiða við nýggja uppskotinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 7. apríl 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin kann arbeiða víðari við spurninginum um at flyta veglinjuna á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkarhjalla.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, arbeitt við uppskoti sum tekur støði í, at Ytri Ringvegur verður fluttur á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkahjalla. Víst verður til korttilfar í málinum (merkt 2405051/BH) við plássi fyri planskildari íbinding við Løgmannabreyt einaferð seinni.

Samlaða fyrireikandi arbeiðið, ið talan er um at fara undir at bjóða út, er:

1. Ytri Ringvegur frá st. 8.330 til st. 9.275 (kostnaður uml. 12,5 mió. kr.)
2. Brúgv á st. 8.900 (við Løgmannabreyt) (kostnaður uml. 4,5 mió. kr.)
3. Leingjan av Løgmannabreyt og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.)
4. Leingjan av Klingruni og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribilsmetingum verður samlaði kostnaðurin fyri nevndu arbeiði mettur til uml. 21 mió. kr.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við at bjóða omanfyri nevndu arbeiði (1,2,3 og 4) út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt,
at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina,
at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina,
at innkomnu tilboðini verða at leggja fyri teknisku nevnd aftur

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, tó so at arbeiðið skal verða boðið út í almennari lisitatión skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Landsverk gjørt uppskot til vegalinju.

Býararkitekturin mælir til at nevndin góðkennir vegalinjuna vísandi til samtyktina 2 mai 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Samtykt at góðkenna vegaføringina sambært framløgu.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 17. oktober 2005 kl. 10.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol og greiðir saman við ráðgeva frá úrslitinum. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli til fundin.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, samtykti at mæla býráðnum um figgjarnevndina til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Articon álj. kr. 22.618.484,00, sí j. nr. 2005-2689/1 og licitatiónsprotokoll, sí j. nr. 2005-2689/5.

Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, mælir harumframt til at taka av tilboðum frá sama byggifelag upp á gerð av gongu- og súkklubreyt, gongutunnli og volla álj. kr. 2.259.140,- soleiðis at samlaða upphæddin fyri vegarbeiðið verður álj. kr. 24.877.624,00, sí j. nr. 2005-0516/3.

Afturat hesum skulu leggjast útr. fyri projektering, eftirlit, óvæntaðar útr. og 6,25% mvg soleiðis, at samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiðið verður kr. 31.249.372,00, sí j. nr. 2005-0516/4.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til eisini at taka av tilboðnum frá sama byggifelag uppá gerð av reinskan av vegvatni (j.nr. 2005-1437/2) álj. kr. 1.010.520,00, soleiðis at samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiðið verður kr. 32.494.837,00, sí j. nr. 2005-0516/5.

Ein annar minniluti, Katrin Dahl Jacobsen, tekur ikki undir við ætlaða vegaprojektinum, tí verkætlanin fer at leggja stóran part av náttúruvøkrum lendi undir asfalt.

Minnilutin mælir til, at samráðingar verða tiknar upp við landsmyndugleikarnar av nýggjum um loysn av einum Ytra ringvegi, sum er tíðarhóskandi, tekur hædd fyri øktu ferðsluni, sum verður, tá fast samband verður millum Havnina, Skálafjørðin og Klaksvík.

Minnilutin átalar, at borgarar í kommununi ikki verða eins viðfarnir, eftirsum bert tey, sum búgva uppat kommununnar parti av hesum vegi eru hoyrd, meðan tey, sum koma at liggja uppat landsvegapartinum als ikki eru kunnað ella hoyrd.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, átalar handfaringina av málinum, tí býráðssamtyktin frá 23. juni 2005 ikki hevur verið vird, vísandi til, at onnur arbeiði vóru tengd at útbjóðingartilfarinum, enn býráðið samtykti.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Bjarti Mohr, mælir býráðnum til at taka av einum samlaðum tilboði uppá kr. 23.368.309,00, soleiðis at gøtan/súkklubreyt og reinskan av vegvatni verður gjørd seinri. Samlaði kostnaðurin við projektering, eftirliti, óvæntaðum útreiðslum og mvg verður kr. 28.941.651,00 at fíggja av íløgum til vegagerð.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at taka undir við báðum meirilutatilmælunum í teknisku nevnd og at játta kr. 31.250.000 av íløgum til vegagerð.

Ein samd nevnd mælir harumframt Landsverki til, at borgarar, sum búgva uppat landsvegapartinum, verða kunnaðir og hoyrdir í sambandi við hesa ringvegagerð.

**Býráðið 3. november 2005:** Tikið av skrá.

**Býráðið 24. november 2005:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 15. desember 2005 um vegaføringina av 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringveg, mál nr. 2001-0704), skal málið um vegaføringina viðgerast aftur í teknisku nevnd, áðrenn tað verður lagt aftur fyri býráðið. Í hesum sambandi verður víst á tilboð frá P/F Articon 17. oktober 2005, og smb. ABF 92 frá 8. januar 2001, er tilboðið nú farið úr gildi.

Støða skal verða tikin til um kommunali parturin av Ytra Ringvegi skal broytast soleiðis, at hann framyvir gerst sambindingarvegur og sostatt ikki verður ein ringvegur við planskyldari íbinding við Løgmannabreyt.

Harumframt skal støða verða tikin til, hvussu framtíðar íbinding skal gerast við atkomuvegin til Havnina, sum Landsverk nevna stig 2 í teirra verkætlan.

At enda skal støða verða tikin til um kommunan skal gera avtalu við P/F Articon um broytta projektið ella um alt arbeiðið skal bjóðast út av nýggjum.

Umsitingin greiðir, saman við ráðgeva, frá málinum.

**Tekniska nevnd 12. januar 2006:** Nevndin samtykti at umsitingin fer undir samráðingar við p/f Articon um at gera kommunalan sambindingarveg millum landsvegin og Klingruna at leggja fyri nevndina aftur um 14 dagar.

**Ískoyti:**
Úrslit av samráðingunum verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 9. februar 2006:** Vísandi til at P/F Articon ikki hevur somu einleikaprísir, samtykti ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, at bjóða arbeiðið út av nýggjum til teir somu sum bjóðaðu seinast.

Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen, tekur ikki undir við verkætlanini.

**Ískoyti:**
Vísandi til at fyriliggjandi uppskot um vegaføring ikki letur seg gera - hetta av tí at ein partur av vegnum kemur at liggja inni á komandi økinum á Stórutjørn og kemur sostatt at nerva verkætlanini hjá p/f Jákup á Dul, verður neyðugt at flyta vegin longur suðureftir. Víst verður til fundarfrásagnir í máli nr. 2006-0260.

Støða skal harumframt verða tikin til atkomuviðurskiftini millum Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn, tí í løtuni verður arbeitt við at selja 45 íbúðareindir ovast í útstykkingini Hoyvíkshagi Suður. Tvær av hesum eindunum mugu takast burtur, ella má kommunan ogna sær hesar, so at atkomuviðurskiftini millum Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn eru tryggjað.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at staðfesta avgerðina hjá bygginevndini í sambandi við sambindingarvegin millum Klingruna og Ringvegin smb. j. nr. 2006-0260/6, ið leggur upp til at vegurin verður fluttur longur suðureftir.

Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har ‘faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging’ til eina verkætlan.

Býarverkfrøðingurin mælir til at beina málið í fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, samtykti at heita á Landsverk um at flyta atkomuvegin vestan fyri Stórutjørn longur vestureftir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Katrin Dahl Jakobsen.

**72/06** **2004-2550**

**Viðvíkjandi yvirtøku av vegøkinum á matr. nr. 1242, Tórshavn, part av Brøttubrekku**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Eigararnir av vegøkinum, part av Brøttubrekku, matr. nr. 1242, Tórshavn, biðja kommununa um at yvirtaka vegøkið.

Vegøkið er útlagt 20. desember 1966, tískil skuldi einki verið til hindurs fyri at yvirtaka part av Brøttubrekku. Allir eigararnir hava undirskrivað "Umsóknarblað til yvirtøku av vegi".

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at yvirtaka vegøkið, part av Brøttubrekku, matr. nr. 1242, Tórshavn.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**73/06** **2005-0984**

**Skipan av nýggja heiminum til eldri oman Mattalág.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við skipan av hesum nýggja heiminum til eldri hava samráðingar verið við fyristøðufólkið á Ellis- og umlættingarheiminum, um at heimið verður ein víðkan av búplássunum á Ellisheiminum, soleiðis at raksturin verður so rationellur sum gjørligt.

Kommunan hevur møguleika at keypa ein part av tí innbúgvi, sum er í húsinum, ið eru kvalitetsmøblar við eldri sniði. Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir tað innbúgv, sum er hóskandi til heimið.

Arbeitt verður í løtuni við at kanna, hvørjar ábøtur eru neyðugar, fyri at húsið skal lúka brunakrøv o.a. til eitt heim fyri eldri, og at søkja um stuðul frá Almanna- og heilsumálastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til skipa heimið sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum, sum sostatt verður uppnormerað við 8 búplássum og at søkja Almanna- og heilsumálaráðið um stuðul smbr. løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim.

Eisini verður mælt til at keypa innbúgv og at játta peningin av íløgunum á eldraøkinum. Kostnaður verður lagdur fram á fundinum.

**Sosiala nevndin 7. juli 2005:** Samtykt at taka undir við at heimið verður skipað sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum.

Nevndin samtykti eisini, at heildarætlan verður gjørd fyri ognina.

**Ískoyti:**
J. P. Gregoriussen, arkitektur, sum upprunaliga teknaði húsini, er saman við umsitingini biðin um at gera eina heildarætlan fyri ognina.

Sambært tekningum, dagfestar 14. august 2005, ber til við smávegis broytingum at fáa pláss fyri 10 búfólkum. Tá er eisini niðasta hædd tikin við, har íbúð verður til eini hjún. Av tí at flestu búrúmini eru á ovastu hædd, verður mett neyðugt, at lyfta verður frá kjallaranum og upp á ovastu hædd.

Uttandura verður gjørd suðurvend terassa og gøta frá úthurð. Skipað verður fyri 4 p-plássum inni á grundøkinum. Starvsfólkini kunnu nýta parkeringsplássið við J. Nolsøesgøtu.

Samlaði kostnaðurin við 6,25% mvg. verður mettur til kr. 1.333.438. Innbúgv við meira verður mett til kr. 500.000,- . Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 1.833.438,- og arbeiðstíðin til 5 mánaðir.

Umsókn um studningslán og játtan til rakstur varð 14. juli 2005 send almanna- og heilsumálaráðnum, sum við skrivi, dagfest 9. august 2005, hevur boðað frá, at parturin av umsóknini, sum snýr seg um rakstur frá 1. januar 2006, verður viðgjørdur saman við løgtingslógaruppskotinum fyri 2006.

Viðvíkjandi umsóknini um studningslán verður sagt, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um í heyst at leggja lógaruppskot fyri løgtingið um eina nýggja verklagslóg til fígging av íløgum til ellis- og røktarheim og sambýli, og at fyriliggjandi

umsóknir um studningslán endaliga verða viðgjørdar, tá lógargrundalagið er broytt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitiatión

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til heildarætlan, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Av tí at tað í kostnaðarmetingini ikki er tikin hædd fyri møguligum óvæntaðum útreiðslum, verður mælt til at játta 2 mio. kr. til verkætlanina av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevndin 30. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndin, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 15. september 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Lisitatión varð hildin 7. desember, og varð úrslitið:

| | | |
|---|---|---|
| Henning Hansen | kr. | 1.557.540,00 |
| Karstin Vang | - | 1.418.578,00 |
| D. Jacob Magnussen | - | 1.826.132,65 |
| Byggifelagið Articon | - | 1.730.538,00 |

Ráðgevin J. P. Gregoriussen, arkitektur, hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum.

Samlaði byggikostnaðurin íroknað lyft, ráðgeving og partar av innbúgvi við 6,25% mvg. verður kr. 1.664.197,00. Eftir til innbúgv og útgerð eru sostatt kr. 335.803,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá ráðgevanum og taka av tilboðnum frá Karstini Vang.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

Vísandi til skriv frá Almanna- og heilsumála-ráðnum, dagfest 6. desember 2005, har boðað verður frá, at landsstýrið, grundað á politisku raðfestingina í síni viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006, hevur tikið avgerð um ikki at raðfesta umsóknina viðvíkjandi uppnormering av búplássum á Tórs-havnar Ellis- og umlættingarheimið, samtykti nevndin at biðja um fund við avvarðandi landsstýrismann og formannin í løgtingsins fíggjarnevnd beinanvegin. Málið hevur skund.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd, treytað av, at almanna- heilsumálaráðið veitur stuðul til verkætlanina.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**74/06** <u>**2002-2214**</u>

<u>**Áheitan frá kommunulæknunum í Tórshavnar kommunu um at fáa normerað 10. og 11. kommunulæknastarvið í Havn og um bygging av viðtaluhølum í Hoyvíkshaganum**</u>.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Teir 9 kommunulæknarnir í Tórshavn hava við skrivi, dagfest 26. september 2002, skotið upp og kravt, at býráðið søkir landsstýrið um at skipa fyri tveimum kommunulæknastørvum aftrat í Suðurstreymi. Tað fyrsta í 2003 og tað seinna í 2005.

Víst verður á, at vanliga metanin í norðurlondum er, at ein kommunulækni skal vera fyri hvørji 1500 fólk.

**Sosiala nevndin 8. oktober 2002:** Nevndin tekur undir við áheitanini frá kommunulæknunum og samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at heita á trivnaðarmálaráðið um at normera tvey kommunulæknastørv aftrat í kommununi.

Eisini samtykt at heita á byggi- og býarskipanardeildina um at útvega øki til byggjan av læknamiðstøð til 4 læknar.

**Fíggjarnevndin 17. oktober 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 24. oktober 2002:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Familju- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 8. januar 2003, boðað frá, at ráðið ikki hevur nóg stóra játtan á fíggjarlógini fyri 2003 til at ganga umsóknini á møti.

Lagt verður aftrat, at familju- og heilsumálaráðið arbeiðir við at finna eina varandi loysn fyri kommunulæknaviðurskiftini í Sandoynni, sum møguliga fær ávirkan á kommunulæknaviðurskiftini í Tórshavnar læknadømi.

Ein møgulig nýggj normering í Tórshavnar læknadømi kann tó í fyrsta lagi vera gjørd frá 1. januar 2004, treytað av at neyðug játtan er til taks á fíggjarlógini.

**Sosiala nevndin 4. februar 2003:** Nevndin varð kunnað um málið.

**Ískoyti:**
Við skrivi, dagfest 6. mai 2003, hevur familju- og heilsumálastýrið boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at biðja um hægri játtan á fíggjarlógini fyri 2004 til kommunulæknaskipanina, til tess at tvey kommunulæknastørv aftrat kunnu normerast í Suðurstreymoyar Læknadømi. Treytað av, at nevnda meirjáttan fæst, kann umsóknin frá Tórshavnar kommunu gangast á møti.

**Sosiala nevndin 10. juni 2003:** Nevndin varð kunnað um skrivið frá familju- og heilsumálastýrinum og mælti til, at peningur verður settur av á komandi íløguætlan, so farið kann verða undir at gera byggiprogramm.

**Nýtt:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi, dagfest 1. juni 2004, boðað frá, at ráðið nú hevur normerað tey umbidnu kommunulæknastørvini, men at hesi ikki verða lýst leys, fyrr enn Tórshavnar kommuna hevur viðtaluhøli til taks til teirra.

**Uppskot til innstilling:**
Sosialdeildarleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at fyrireikingar verða gjørdar til bygging av viðtaluhølum í Hoyvíkshaganum, har øki er lagt av til endamálið, og at peningur til byggingina verður settur av á íløguætlanini fyri 2005 og 2006.

Eisini verður mælt til, at bygningurin skal kunna hýsa 4 kommunulæknum, so læknin sum heldur til í J. Paturssonargøtu eisini fær viðtalu har, og at pláss verður fyri einum møguligum 12. kommunulækna einaferð í framtíðini.

Somuleiðis verður mælt til, at hølini verða soleiðis innrættað, at læknarnir, í tann mun tað yvirhøvur ber til, verða felags um og samstarva um hølini.

**Sosiala nevndin 7. september 2004:** Ein meiriluti, Beate L. Samuelsen, Heðin Mortensen, Torfinn Smith og Hildur Eyðunsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum frá sosialdeildarleiðaranum og trivnaðarstjóranum og beina málið til teknisku fyrisitingina til gerð av byggiprogrammi og at játta kr. 150.000,00 av íløguætlanini 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir ikki, at málið er búgvi at taka støðu til, og kann tí ikki taka undir við tilmælinum.

**Nýtt:**
Býararkitekturin setti 1. juni 2005 byggibólk at gera arbeiðsskrá. Í arbeiðsbólkinum eru Kári Finnson frá byggideildini, formaður, Eyðun Jensen, deildarleiðari og Selmar Nielsen, arkitektur, ráðgevi og skrivari.

Í kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, verður í § 1, stk. 4, nevnt, at kommunan eigur at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknunum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsurøkt.

Vísandi til omanfyristandandi og at henda læknaviðtala í framtíðini skal servisera ein stóran býarpart, metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at vera at leggja fleiri funktiónir innan heilsurøkt í sama bygningi, t.d tannlækni, fysioterapi, kiropraktor v.m.

Eisini metir byggibólkurin og býararkitekturin, at umhugsað eigur at verða, um bygningurin ikki eisini eigur at rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðaravloysarar, sum kommunan, sambært § 6, stk. 1, í løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan, hevur skyldu at útvega frían bústað til.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur víst á grundøki í nýggju útstykkingini í Hoyvíkshaganum, har mest loyvda bygging er tvær hæddir á um leið 960 $m^2$. Harav eru um leið 225 $m^2$ ein arkada, sum gongur ígjøgnum niðaru hædd á bygninginum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt serligar ásetingar fyri miðstaðarbygging fram við Karlamagnussarbreyt, sum eru góðkendar av byggi- og býarskipanarnevndini. M.a. er ein áseting, at endin á bygninginum, sum vendir út ímóti vegnum og 6 metrar inn, skal hava eina útvenda funktión, t.d. handil, matstova v.m. Í sambandi við bygging av læknaviðtalu kundi hesin partur passandi verið eitt apotek.

Av tí at læknaviðtalan helst verður fyrsti bygningurin í miðstaðargøtuni í Hoyvík, metir býararkitekturin, at Tórshavnar kommuna eigur at leggja støði undir og verða fyrimynd fyri víðari bygging í økinum.

Byggibólkurin hevur latið gjørt arbeiðsskrá og kostnaðarmeting fyri viðtaluhøli til 4 kommunulæknar, sum verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til, at arbeiðssetningurin hjá byggibólkinum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina. Eisini verður nevndin biðin

um at taka støðu til, um bygningurin eisini skal rúma tveimum íbúðum til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Málið varð umrøtt, og heitir nevndin á umsitingina um at kanna, um nakar áhugi er fyri at verða partur í verkætlanini.

**Nýtt:**
Fundur hevur verið við umboð fyri Landsapotekaran, sum í skrivi, dagfest 31. januar 2006, hevur boðað frá, at Apoteksverkið er áhugað at vera við í byggiætlanini við á leið 500 m².

Eisini verður sagt, at teirra politikkur higartil hevur verið, at Apoteksverkið eigur tey høli, tey eru í, og at Apoteksverkið er sinnað at verða við í projekteringini, treytað av at avvarðandi myndugleikar góðkenna endaliga projektið.

**Sosiala nevndin 7. februar 2006:** Samtykt at arbeiðssetningurin hjá byggibólkinum verður víðkaður, soleiðis at tað í bygninginum eisini verður møguleiki fyri øðrum funktiónum innan primeru heilsurøktina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og at játta kr. 150.000,00 til byggiprogramm og skitsuprojekt av íløgum og at velja bygginevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt og at velja Elin Lindenskov og Bjarti Mohr í bygginevndina.

**75/06** **2005-0511**

**Kanning av tørvinum á eldrabústovnum í Tórshavnar kommunu og bygging av ellis- og røktarheimi Yviri við Strond.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Við støði í skrásetingunum hjá Heimarøktini av røktartørvinum hjá tí einstaka brúkaranum gjørdi Almanna- og heilsumálastýrið í 2005 eina kanning av tørvinum á ellis- og røktarheimsplássum.

Kanningin vísti, at tá Heimið við Vallalíð og nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn vóru tikin í nýtslu, vildi tørvurin í Suðurstreymi vera:

16 røktarheimspláss
29 ellisheimspláss
4 pláss til minnisveik
3 sambýlispláss

Tilsamans er sostatt tørvur á 52 plássum

Eftir tilmæli frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum samtykti sosiala nevnd tann 7. juni 2005, at farið varð undir fyrireikingar at byggja nýtt ellis- og røktarheim at nøkta tørvin á eldrabústøðum, og at játtaðar vóru kr. 100.000,00 av konto 40-3197 (Tiltøk á eldraøkinum) til gerð av byggiskrá.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Stovnsleiðararnir á verandi eldrabústovnum í kommununi hava latið gjørt eina nýggja kanning av tørvinum.

Sambært hesi kanning er tørvurin, eftir at nýggja røktarheimið við Hoyvíkstjørn er tikið í nýtslu:

21 røktarheimspláss
38 ellisheims- og ella sambýlispláss
26 pláss til minnisveik
9 pláss til brúkarar við serligum tørvi (psykiatriskt røktarheim)

Samlaði tørvurin er sostatt 94 pláss.

Hóast nakrir av hesum brúkarum ikki beinleiðis hava ein bráfeingis tørv, so er eingin ivi um, at tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum í kommununi framvegis er stórur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin mælir til, at nevnd verður sett at fyrireika arbeiðið at byggja nýtt ellis- og røktarheim á trøðni, sum kommunan ognaði sær Yviri við Strond, og at 500.000 kr. verða játtaðar av íløgunum á eldraøkinum til endamálið.

**Sosiala nevndin 11. apríl 1006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 500.000,00 av íløgum á eldraøkinum til gerð av byggiskrá til ellis- og røktarheim Yviri við Strond og at seta bygginevnd.

Nevndin samtykti eisini at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at broyta byggisamtyktina fyri økið, so tað kann brúkast til omanfyri nevnda endamál.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**76/06** **2001-1587**

**Sankta Frants - nýbygging av smábarnaskúla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grundøki:**
Matr. nr. 779 f, støðd 4846 fermetrar.

| | | |
|---|---|---|
| Verandi ábygging | 1246,00 fermetrar | ábygging 0,26 |
| Verandi nýtsluøki | 3300,85 fermetrar | nettonýtslustig 0,68 |

Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3, og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðs-umhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m² x 16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.

Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum, um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum.

Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

<u>at</u> alt ov nógv er bygt á økið sum er.
<u>at</u> ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.
<u>at</u> nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skógfriðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

| | |
|---|---|
| Byggistig : | 0,25 |
| Nettonýtslustig: | 0,30 |

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m²

Sambært hesum uppskoti er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr. nr. 779b, soleiðis at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum tilber.

Henda ætlan innber, at matr. nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.

Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779f upp á 4 m breiðan vegaskap. Tekning j. nr. 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a. Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005.

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587-34.

Nýggj umsókn, dagfest 24. juli 2003, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum, har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420 m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779f, stødd 4846 fermetrar.

| | | |
|---|---|---|
| Verandi ábygging | 1246,00 fermetrar | ábygging 0,26 |
| Verandi nýtsluøki | 3300,85 fermetrar | nettonýtslustig 0,68 |

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið: 1676 : 6776 = 0,25. Nettonýtslustigið verður: 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779a standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779a og matr. nr. 779b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til, at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**Ískoyti:**
**Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla**.

Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendi er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.

Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 $m^2$.

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni 2005 metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøðurnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og dispositiónsuppskot verða framløgd.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
**Brot úr byggiskránni**:

"Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Skt. Frans skúla. Nevndin er mannað av:

| | |
|---|---|
| Unnie Justinussen | Tórshavnar kommuna/tekniska fyrisiting |
| Høgni Joensen | Tórshavnar kommuna/trivnaðarfyrisitingin |
| Selmar Jacobsen | Skúlastjóri/Skt. Frans skúli |

Skrivari hjá nevndini er Rúni Abrahamsen MAP Arkitektar.

Tað hava verið gjørdar fleiri ætlanir at útbyggja Skt. Frans skúla, men lítið annað er hent enn onkrar hissini umvælingar.

Ein av orsøkunum at einki enn er hent, kann vera, at einki byggilendi er til skúlan. Onkur ætlan hevur verið at byggja niðaneftir móti viðalund og kleystrinum, men hesar eru steðgaðar av náttúrufriðingarnevnd og skógrøkt landsins. Fransiskanararsystrarnar eiga eisini økið aftan yri skúrarnar við fimleikahøllirnar.

Kommunan hevur sent umsóknir til náttúrufriðingarnevndina, sum til síðst góðkendi eitt uppskot uppá 430 fermetrar í einari hædd, bygt har skúrarnir standa í dag. Náttúrufriðingarnevndin skal somuleiðis hava uppskotið til bygging til góðkenningar.

Hetta hevur verið útgangsstøðið hjá bygginevndini."

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til, at bygginevndin arbeiðir víðari við byggiskránni, har kostnaðurin verður kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgv.

Skúlastýrið í Sankta Frans skúla hevur biðið um fund við mentamálanevndina um ætlanirnar hjá nevndini um byggjan av nýggjum smábarnaskúla til forskúla og 1. flokk.

**Mentamálanevndin 28. mars 2006:** Mentamálanevndin møtti á fundi í Sankta Frans skúla, har nevndin hevði fund saman við skúlastýrinum.

Samtykt at viðgera málið aftur á næsta fundi í mentamálanevndini, sum verður týsdagin 4. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentamálaleiðaranum at byggja skúlabygning fyri kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgvi, tilsamans kr. 9 mió.

Nevndin samtykti eisini at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at bjóða arbeiðið út í umvendari licitatión og at fíggja arbeiðið av íløgum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og samtykt at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**77/06** **2006-0728**

**Umskipan av sjálvsognarstovninum Dagstovnurin í Hoyvík**.

Í skrivinum verður sagt:

"Mánadagin 14. november 2005 helt nevndin fyri sjálvsognarstovnin fyri Dagstovnin í Hoyvík fund. Til viðgerðar var m.a. umrøða av spurninginum um at leggja dagstovnin undir kommununa og at taka sjálvsognarstovnin av.

Orsøkin til umrøðuna av hesum spurningi er, at umskipanin er eitt ynski frá býráðnum, og at tað fyri nevndini samstundis er upplýst, at umstøðurnar á stovninum sum heild verða tær somu eftir umleggingina.

Nevndin tók í prinsippinum undir við ætlanini um at taka sjálvsognarstovnin av og at leggja virksemið á dagstovninum undir kommununa. Í hesum sambandi gjørdi

nevndin av at seta seg í samband við Tórshavnar kommunu fyri at vita, hvørja støðu kommunan hevur til hesa ætlan.

Nevndin fyri sjálvsognarstovnin skal tí við hesum formliga boða frá, at nevndin er sinnað at leggja dagstovnin undir kommununa skjótast gjørligt og í framhaldi av hesum at taka sjálvsognarstovnin av.

Nevndin ynskir tí at frætta frá kommununi, hvørja ítøkiliga støðu kommunan hevur til ætlanina, serliga tað at yvirtaka starvsfólkini á sjálvsognarstovninum, treytirnar fyri yvirtøkuni annars, nær dagstovnurin í fyrsta lagi kann verða lagdur undir kommununa og frá hvørjum degi kommunan kann góðkenna, at sjálvsognarstovnurin verður tikin av, samanber §§ 9 og 10 í viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin.

**Tilmæli:**
Leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mælir býráðnum, um mentamálanevndina og fíggjarnevndina, til at taka undir við nevndini fyri Dagstovnin í Hoyvík um at taka sjálvsognarstovnin av og at leggja virksemið av dagstovninum undir kommununa 1. juli 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá leiðaranum fyri barna- og ungdómsdeildina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**78/06** **<u>2005-1458</u>**

**<u>Viðvíkjandi hølisviðurskiftunum í frítíðarskúlunum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Skúlaárið 2005/2006 er frítíðarskúlin víðkaður við 2. flokki. Áleið 220 børn hava tikið av hesum tilboði.

Fyri at fáa pláss fyri øllum børnunum leigar kommunan seg inn í Grønlendingahúsið, Bridgehúsið, og B36 húsið.

Framhúsið í Gundadali, ið hevur verið barnagarður í nøkur ár, er tikin til frítíðarskúla. Harumframt hevði Dr. Ingridar barnagarður eina tóma stovu, sum er gjørd til frítíðarskúla. Eisini Margarinfabrikkin hevur frítíðarskúla í ár, har ganga 9 børn í 2. flokki úr Adventistaskúlanum.

Tað sum eisini hjálpir um hølisviðurskiftini er, at bæði í Argja og Hoyvíkar skúla ganga børnini í 1. flokki seinrapart og 2. flokkur fyrrapart í skúla, so hesir flokkar skiftast til at ganga í frítíðarskúla ávikavist fyrra- og seinrapart.

Skúlaárið 2006/2007 letur nýggjur skúli upp í Hoyvík, sum eisini rúmar frítíðar-skúla.

Børnini, sum ganga í frítíðarskúla í Stoffalág 60, flyta eftir ætlan niðan 1. mai. Leigumálið í Stoffalág 60 gongur út 1. juli 2006. Men av tí at hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi í B36 húsinum og í Bridgehúsinum (sáttmálarnir eru sagdur upp), hevur kommunan framhaldandi brúk fyri húsinum í Stoffalág 60, ið hevur riggað væl sum frítíðarskúli.

Ætlanin er, at forskúlin úr Sankta Frans skúla og 1. flokkur úr Adventista-skúlanum skulu ganga í Stoffalág 60. Umsitingin hevur vent sær til Handverkara-felagið um at leingja leigusáttmálan, og vil nevndin í felagnum fegin leiga kommununi húsini, treytað av, at leigan fer upp.

Kommunan fór at leiga frá Handverkarafelagnum í juli 2000 fyri kr. 15.000,00 um mánaðin, og er leigan ikki farin upp síðani. (Handverkarafelagið sendir áheitan hesa vikuna um at hækka leiguna. Sáttmálin verður lagdur fyri fíggjarnevndina).

Raksturin av frítíðarskúlanum í Stoffalág 60 frá 1. august til 31. desember við 50 børnum verður kr. 1.086.250 fyri kommununa.

Ein partur av játtanini kann flytast av rakstrinum í Bridgehúsinum, B36 húsinum og Margarinfabrikkini, har tilsamans 44 børn eru í dag. Frítíðarskúlin á Argjum og Smílibýlið fara at hava heldur færri børn í ár. So raksturin fyri Stoffalág 60 kann haldast innan verandi játtan hjá frítíðarskúlunum.

**Tilmæli:**
Leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mælir mentamálanevndini til, at kommunan leingir sáttmálan við Handverkarafelagið og søkir eftir leiðara og starvsfólkum til frítíðarskúlan í Stoffalág 60. Játtanin til frítíðarskúlan verður flutt av játtanini hjá omanfyri nevndu frítíðarskúlum.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá leiðaranum fyri barna- og ungdómsdeildini og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

79/06 **2006-1052**

**Umsókn frá KSF, dagfest 16. mars 2006, um loyvi at hækka og leingja húsalánið**.

Biðið verður um heimild at hækka lánið við 330.000 kr. og leingja afturgjaldstíðina soleiðis, at gjaldið framhaldandi verður tað sama um mánaðin og tí ikki kemur at ávirka limagjaldið.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta umbønini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

80/06 **2006-1069**

**Viðv. Hoyvíkar kirkju**.

Bygginevndin hevði fund við fíggjarnevndina 15. mars 2006, har stuðulin frá kommununi til kirkjuna var umrøddur.

Í síni tíð var lovað, at kirkjan skuldi fáa ókeypis grundstykki, men tann samtyktin var seinri broytt, soleiðis at kirkjan mátti gjalda eina upphædd, sum táttaði upp móti milliónini fyri grundstykkið.

Skotið var upp á fundinum, at kommunan stuðlar við at rinda fyri lendisviðgerð av økinum kring Tútukannutjørn, parkeringspláss og eyka kloakk, og harafturat letur kommunan kopartekjuna sum eina gávu til kirkjuna.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at játta kr. 4.000.000,00 yvir 5 ár av konto 64.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til at taka undir við samtyktini í fíggjarnevndini 18. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt á fundi aftur mikudagin 26. apríl 2006, kl. 15.30.

**Mentamálanevndin 26. apríl 2006:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen og Jógvan Arge, samtyktu at játta kr. 3.000.000,00 yvir 5 ár av konto 64 til uttanum økið.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Annika Olsen, samtyktu at taka undir við samtyktini hjá fíggjarnevndini 18. apríl 2006, at játta kr. 4.000.000,00 yvir 5 ár av konto 64.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini 18. apríl 2006, og at peningurin verður brúktur til uttanumøki og byggilistarligu útsjóndina.

**81/06** **2006-1241**

**Keyp/bygging av hølum til umsitingina.**

Stjórnin vísir á, at kommunan og kommunalu uppgávurnar vaksa í stórum og mælir tí til, at fleiri umsitingarhøli verða útvegað sum skjótast.

Mælt verður til at loysa hølistrupulleikan í stigum soleiðis:

1. stig: Kommunan keypir bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthersgøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mllió. kr.
2. stig: Farið verður beinan vegin undir bygging av skrivstovubygningi/býráðssali á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin eru.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum og at fíggja keypið sum útlegg.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Fyrst varð atkvøtt um at at keypa bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthersgøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mllió. kr., ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð varð atkvøtt um at fara undir kanning av møguleikunum fyri at byggja skrivstovubygning/býráðssal, ið tekur seg væl út á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen

**82/06** **2005-1538**

**Íløguætlan hjá sløkkiliðsstøðini.**

Ein mió. kr. eru markaðar til íløgur til sløkkiliðsstøðina.

Brandmeistarin hevur misskilt mannagongdina viðv. játtan til íløgur og sett arbeiðið í gongd, áðrenn áheitan var løgd fyri nevndir og býráð.

Arbeiðið var steðgað, tá greitt var, at mannagongdin ikki var fylgd.

**Tilmæli:**
Fyri at fáa gongd aftur á arbeiðið og hetta gjørt liðugt, mælir brandmeistarin til, at avsett verður ein mió. kr. til liðugtgerð av økinum eystan fyri brandstøðina.

**Brunanevndin 11. apríl 2006:** Samtykt.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við brunanevndini og at játta kr. 1.000.000,00 av íløgum.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**83/06** **2006-1324**

**Túnið framman fyri margarinfabrikkina.**

Í samband við virksemið hjá Margarinfabrikkin hevur leiðarin framsett ynski um at umskipa útiøkið framman fyri bygningin í Tórsgøtu.

Í samráð við leiðaran hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot fyri økið, sum verður umskipað til eitt blandað uppihalds- og urtagarðsøki.

Umráðandi er, at økið er klárt at taka í brúk til tiltakið Asfalt, 2-3 juni.

Býarskipanardeildin hevur biðið um 2 undirhondsboð frá Articon og Hjálpirót.

Tilboðsupphæddirnar vóru ávikavist kr. 317.500,00 frá Articon og kr. 194.740,00 frá Hjálpirót, bæði tilboðini vóru uttan mvg.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka av lægsti tilboði uppá 194.740,00 frá Hjálpirót, og at upphæddin verður játtað av íløgukonto fyri fríðkan av býnum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 195.000,00 av íløgum.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**84/06** **1999-2581**

**Broytingar í kommunustýrisskipanini.**

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við broytingunum.

**Ískoyti:**
Við heimild í kunngerð nr. 14 frá 15. mars 2006 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini verða gjørdar hesar broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu:

**1.**
Í 7. parti, § 39, 1. petti, verður "38. flokk" broytt til "39. flokk"

**2.**
Í 7. parti, verður § 39, 11. petti, orðað soleiðis:

"**11. petti.** Árliga fasta samsýningin til formenn í byggi- og býarskipanarnevndini, havnanevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning."

Í 7. parti, verða § 39, 12. og 17. petti, strikað.

13.-18. petti verða hereftir 12.-16. petti.

**3.**

Í 7. parti, verða § 39, 13.-14. petti, sum verða 12.-13. petti, orðað soleiðis:

"**12. petti.** Árliga fasta nevndarsamsýningin til býráðslim, sum er limur í einari av føstu nevndunum (byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini, havnanevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini, sosialu nevnd og teknisku nevnd) er 12 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

**13. petti.** Formenn og nevndarlimir í hesum nevndunum fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annnað ásett í aðrari lóg:

1) Staðbundnu nevndunum
2) hegn- og vatnsýnisnevndini
3) leigunevndini
4) brunanevndini
5) hýruvognsnevndini
6) skúlaráðnum
7) ferðslunevndini
8) gøtunavnanevndini
9) musikkskúlanevndini
10) nevndini fyri vardar íbúir
11) kollegiunevndini
12) M. A. Jacobsens virðislønarnevndini og
13) barnabókaheiðurslønarnevndini."

**4.**

Í 7. parti, verður § 39, 18. petti, sum verður 16. petti, orðað soleiðis:

"**16. petti.** Onnur enn kommunustýrislimir fáa fundarpening fyri arbeiði í nevndum o.l., sum býráðið hevur valt tey í, eftir reglunum í § 9 í kunngerðini um samsýning."

**5.**

Sum nýtt 17. petti verður sett:

"**17. petti.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann fara uttanlands vegna skeiðsluttøku, kunningarferð, umboðan v.m. Tá verður samsýning ella endurgjald latið einstøku kommunustýrislimunum eftir reglunum í 4 í kunngerðini um samsýning.

Ynskir ein nevnd at fara uttanlands, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at fara uttanlands, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

Borgarstjórin ferðast sambært egnari fíggjarætlan og kann góðkenna, at vara-maður luttekur í hansara stað.

Verða ørindini samsýnt av øðrum, verður eingin samsýning latin frá býráðnum."

**6.**

Hesar broytingar koma í gildi 1. mai 2006.

**4. Viðmerkinar til einstøku broytingarnar:**

**Ad 1**

Við broytingini verður borgarstjórin umflokkaður úr 38. í 39. flokk. Hetta hevur við sær, at mánaðarliga samsýningin hækkar úr kr. 43.826,14 til kr. 46.917,20.

**Ad 2**

Við umorðingini av 11. petti verða 11. og 12. petti samanskrivað. Hetta hevur onga broyting við sær viðv. upphæddini, ið samsýnt verður við.

**Ad 3**

13. petti verður broytt til 12. petti, samstundis sum tilvísingin til kunngerðina um samsýning verður nágreinað. Upphæddin, ið samsýnt verður við, verður ikki broytt.

Broytingarnar í 13. petti (áður 14. petti) hava við sær, at allir kommunustýrislimir, við undantaki av borgarstjóranum, ið eru limir í brunanevndini, hýruvognsnevndini og øllum teim staðbundnu nevndunum, fara at fáa fundarpening fyri arbeiðið í hesum nevndunum. Eisini verða allar aðrar nevndir enn føstu nevndirnar nú javntsettar og umrøddar í somu áseting.

Við broytingini verða 13. (áður 14. petti) og 17. petti samanskrivað. Hetta er tí, at tær nevndir, ið 17. petti umrøður, nú verða uppreksaðar í 13. petti, har samsýningin til teir kommunustýrislimir, ið eru nevndarlimir, eisini verður ásett.

**Ad 4**

Einasta broytingin er, at nágreinað verður, at tað snýr seg um persónar, ið býráðið hevur valt í nevnd o.l., eins og tilvísingin til grein 8 í kunngerðini um samsýning verður rættað til grein 9. Hetta eru onnur enn kommunustýrislimir (t.d. limir í staðbundnu nevndunum), ið eru vald í nevndir og annað.

**Ad 5**
Nágreinað verður, at samsýningin til kommunustýrislimir, ið ferðast uttanlands, er fundarpeningur eftir vanligu reglunum ella fyri skjalprógvaða mista inntøku.

**Ad 6**
Ásett verður, at broytingarnar koma í gildi 1. mai 2006.

**Tilmæli**
Kommunustjórin mælir til, at broytingarnar omanfyri undir pkt. 3, nr. 1-6, verða gjørdar í kommunustýrisskipanini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**85/06** **2006-0258**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum ellisheimi Yviri við Strond sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið av skrá.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Valdar vórðu Katrin Dahl Jakobsen og Beate L. Samuelsen.

**86/06** **2006-0259**

**Val av 2 limum í bygginevndina fyri nýggjum reinsiverki í Havnardali sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið av skrá.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen.

**87/06** **2005-0067**

**Umval av tiltakslimi í umboðsnevndina hjá SEV.**

Nýggjur tiltakslimur skal veljast ístaðin fyri Erling Michelsen, sála.

Fastur limur er Sjúrður Olsen.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Inga Dahl varð vald sum varalimur.

**88/06** **2006-1259**

**Setan av trivnaðarstjóra.**

Tórshavnar kommuna lýsti starvið sum trivnaðarstjóri leyst í teimum føroysku bløðunum og á www.olivant.fo. Umsóknarfreistin var úti 10. apríl 2006.

Inn komu 7 umsóknir, og setanarbólkurin hevur tann 26. apríl 2006 havt samrøður við 5 umsøkjarar.

**Tilmæli:**
Setanarbólkurin mælir til, at seta

**Ingibjørg Berg**

í starvið sum trivnaðarstjóri.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá setanarbólkinum og seta Ingibjørg Berg í starv.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt.

**89/06** **2005-1476**

**Heildarætlan fyri økið vestan fyri ítróttarhøllina í Kollafirði**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsiting hevur latið gjørt uppskot til heildarætlan fyri økið kring ítrótttahøllina og skúlan og nýggju læknaviðtaluhølinini.

Fyri at ítróttarhøllin kann fáa nýtsluloyvi, er neyðugt at nøktandi parkeringspláss verða útvegað.

Ætlanin leggur upp til, at økið verður skipað sum eitt samlað felags parkeringspláss, serstakliga verður hugsað um parkeringsviðurskiftini hjá ítróttarhøllini og læknaviðtaluhølini.

Hjálagt er tilfar um ætlanina. j.nr. 2005-1476.

Kostnaðarætlan kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið, og heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Málið útsett til kostnaðarætlan fyriliggur.

**Ískoyti :**
Býarskipan hevur fingið til vegað kostnaðarætlan fyri verkætlanina. j. nr. 20051476/3.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið, soleiðis at arbeiðast kann við at bjóða arbeiðið út, og heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í mentamálanevndina í sambandi við fígging.

**Mentamálanevndin 17. januar 2006:** Málið varð umrøtt og beint til umsitingina til víðari viðgerð og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 250.000,00 av íløgum heilsumál, kr. 750.000,00 av íløgum á skúlaøkinum og 1,5 mill. kr. av íløgum á ítróttar og frítíðarvirksemi. Eisini verður mælt til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Eisini samtykt at innkomin tilboð verða løgd fyri mentamálanevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti.**
Umsitinging hevur latið gjørt útbjóðingartilfar til p-plássið, og 6 bjóðandi luttóku í útbjóðingini. 3 boð eru komin inn.

| | |
| --- | --- |
| J&K Petersen | 1.698.033 kr. |
| Við Sjógv | 1.691.304 kr. |
| Samtakið Hansen og Jacobsen | 1.902.862 kr. |

**Tilmæli.**
Mælt verður til at taka undir við lægsta tilboði hjá ”við Sjógv” upp á 1.691.304 kr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. apríl 2006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at taka av lægsta tilboðnum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:05**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
| --- | --- | --- |
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |